# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Gunnvør Bech,** fødd Stenberg, úr Svínoy, andaðist í Hillerød leygardagin, 63 ára gomul

**Hanna í Selvindi** andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 83 ára gomul. Kistan kemur í Sjóvar kirkju týskvøldið kl. 19:30. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju mikudagin kl. 13.

Kistan við **Minnu Jórun Dam** ferð úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsið, týskvøldið, kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni, mikudagin kl. 13.30.

**Guðrið Poulina Johannesen**, fødd Egholm, ættað úr Tórshavn, búsitandi í Bryndum í Danmark, andaðist leygardagin 61 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Minna Jórun Dam**, fødd Ósá, andaðist leygardagin 10. november á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 58 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

## Tøkk

Tøkk tit, sum fylgdu beiggja mínum, og mammubeiggja okkara

**Bent Olsen**
Tórshavn

til hvíldarstaðið
Takk til Kristine Hestbæk, prest.
Takk til starvsfólkið í kirkjugarðskapellinum, til sangarar og berarar, og til gravarhjálpina.
Takk tit, sum hjálpti til við ervinum, og takk fyri blómur og kransar.

*Familjunnar vegna*
**Erla Joensen**
**Heidi Viberg Dam, Erland Viberg Joensen**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góða kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Poula Danielsen**
Skála
Vanliga nevnd Poula í Trøðni

andaðist fríggjadagin 9. november.
Jarðarferðin verður úr Skála kirkju týsdagin 13. november kl. 13.

*Vegna tey avvarðandi*
**Hjalmar, Andrass, Pállfríða, Jóhanna og Pætur**

**Dagurin**
**14. november. Fríðrikur.** Hildið verður, at her verður sipað til ein biskup í Utrecht, sum varð myrdur av leigudrápsmonnum í 838. Keisarinnan Judita hevði sent teir, av tí at Fríðrikur hevði roynt at fáa keisaran til at skiljast frá henni.

# Við takksemi, Eyjálvur Mikkelsen

So fór aftur ein um sýnina, afur ein var liðugur at laða sín vara.

Sjálvt um árini vóru komin, so er ikki lætt at góðtaka at tíðin var har og tímarnir taldir.

Eyjálvur var soleiðis, at vit hildu at hann altíð fór at verða, har hann altíð hevði verði, hann var við tí góða og góðsliga, altíð við tí positiva, sjálvt tá svartast sá út.

Eyjálvur var familjukærur sum fáur, ja, tað hann ikki visti, var ikki vert at vita. Hann visti alt um øll, tá familjur vóru á skránni. Vit hava mist - næstan - eina leksikon, tá gamla Havnin var uppi og vendi.

Eyjálvur var ein ógvuliga vitugur maður, upplýstur og væl belisin, ikki bert frá einari síðu, men fleiri. Hann visti hvat hann tosaði um.

Tá hugsað verður um barna- og ungdómsárini, vóru tey ikki løtt, tey í Dávastovu mistu faðir og móðir alt ov tíðliga, yngstur av 12 systkjum var tað ikki altíð so lætt tað heila.

Næstan at vaksa upp á Sanatoriinum í Hoydølum var ikki altíð so stuttligt, og vóru tað sera ring ár, ið Eyðálvur og fleiri av beiggjum hansara máttu ígjøgnum.

Hóast mótgongd, sorg og sjúku, so koma nøkur fólk styrkt úr trongdini, Eyjálvur var heldigur, hann fekk tann dýrabara skatt at møta Ullu, tey vóru nakað heilt fyri seg og sigldu heilskapað um skerini.

Nú gøtan er enda og hurðin er læst, sita vit við minninum, minninum um allar tær góðu løtur, allan láturin, allar søgurnar og tað vitan, vit fingu við í okkara viðføri.

Vit hyggja niðan á sýnina. Varðar av ymiskum støddum og skapi daga móti sólsetrinum. Eyjálvur hevur lagt sín síðsta stein og er farin heim, vit syrgja við takksemi. Hansara varði er liðugur.

Góði Eyjálvur, fyri okkum vóru tú og Ulla okkara, fyri Steingrím og Lisu vart tú abbin, túsin takk.

**Við sorgblídni**
**vit á Norðasta Horni**



*Eyjálvur og Ulla*

# Realskúlaflokkur í 1955



Her er ein av myndunum frá stóru realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Myndin er tikin av realskúlanæmingum á einum gongutúri í Stoffalág í 1955.

**Tey trý aftast** (sita á steininum) f.v.: Marita Andreassen (Guttesen), Ady Vilhelmsen (Hovgaard) og Kjeld Thomsen

**Fremra rað f.v.:** Lisbeth L. Samuelsen (Petersen), Randi Djurhuus, Tóra T. Jacobsen (Arge), Elsebeth Sørensen, Sonja Akraberg Hansen (Debes), Jacobina Samuelsen (Setberg), Karen Nonnegaard Pedersen, Anna Egholm (á Steig), Thomas Nygaard (lærari), Hanus Wardum, Gorm Simonsen, Haldane Joensen og Samson Joensen.

*Myndaeigari: Inga Simonsen*